GJALDSTOVAN

# Treytir

**viðvíkjandi veiting av**

kolonial, kølivørum, frystivørum, eplum og feskum kjøti.

til Landssjúkrahúsið, Glasir og møguligar aðrar almennar stovnar

6. februar

GJALDSTOVAN | KVÍGGJARTÚN 1 | ARGIR | POSTBOKS 2009 | FO-110 TÓRSHAVN | FØROYAR
TEL +298 35 24 00 | FAX +298 35 24 01 | GJALDSTOVAN@GJALDSTOVAN.FO | WWW.GJALDSTOVAN.FO

# 1. Lýsing

Hesa treytir eru galdandi fyri veiting av kolonial, kølivørum, frystivørum, eplum og feskum kjøti til Landssjúkrahúsið og Glasir.

Tilboðsgevarin skal veita vissu fyri, at tað sum verður útvega eftir hesi avtalu lýkur tey krøv, lógir v.m., sum eru galdandi í avtalutíðarskeiðinum.

# 2. Góðskukrøv

Vørurnar skulu vera egnaðar til endamálið og fylgja galdandi standardum og normum, sum er vanligt at seta til vøruna. Vørurnar skulu allan vegin (framleiðsla, tilevning og veiting) vera viðgjørt eftir til einahvørja tíð galdandi lóggávu innan øki.

Allar vørur skulu vera frískar, javnar og óspiltar og hartil hava ein góðan og frískan smakk. Tað má ikki veitast vørur, ið vísa tekin uppá at vera gamalt ella spilt.

Víst verður eisini til Rakstarreglurnar hjá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni.

Tað er krav, at vørurnar, sum verða bjóðaðar, eru gagnligar til endamálið og lúka galdandi aðalkrøv og fyridømi og lúka krøv frá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni.

Tilboðsgevarin skal tryggja, at góðskan er jøvn/eins og at tilboðsgevarin ger leypandi góðskueftirlit av teimum vørunum í avtalutíðarskeiðinum. Tilboðsgevarin hevur skyldu til at kunna skjalprógva, at góðskueftirlit verða framd, tá stovnar biðja um slík prógv.

Haldføri við móttøku skal í minsta lagi vera 50 % eftir í mun til framleiðsludagin. Tað merkir, at um um hon er framleidd mánadag og heldur seg til fríggjadag, so skal hon vera stovninum í hendi í seinasta lagi mikudagin.

Vørurnar skulu verða pakkaðar fyri at kunna tola flutning og handfaring, og verða veittar til stovnar í nøktandi standi.

Stovnar kunnu biðja um vøruroyndir, har ivamál eru um góðsku, samanberingargrundarlag e.l. Tilboðsgevari ber allan kostnað av møguligum vøruroyndum.

## *2.1 Kølivøra:*

Krøv eru til kuldan við móttøku. Hitin maks 5°C ± 2°C.

## *2.2 Frystivørur:*

Krøv eru til kuldan við móttøku. Hitin -18°C ± -15°C.

## *2.3 Feskt kjøt:*

Tað er eitt krav, at tilboðsgevari kann skera sundur heil lambskrov eftir ávísing. Tað skal eisini vera møguligt at fáa útbeinað lambskjøt. Til malið kjøt og kjøtfars er krav, at feittinnihaldið er í mesta lagi 10-12%.

Krøv eru til kuldan við móttøku:
Hitin maks 5°C einki frávik
Fiskur maks 2°C einki frávik
Um vøran er vakumpakkað, skal dagmerking á vøruna.
Fylgiseðilin er váttan fyri framleiðsludegi.

# 3. Serlig góðskukrøv

Fyri tilboðsgevarar, ið lata inn tilboð upp á feskan fisk og feskar kjøtvørur, er galdandi, at tilboðsgevari skal lata inn lýsing av góðskustýringini / innaneftirlitinum og møguligar almennar góðkenningar (certificeringar). Eisini verður í sambandi við lýsingina biðið um avrit av viðkomandi skjølum so sum:

Avrit av tveimum teimum seinastu vitjanunum frá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni
Lýsing av góðskustýringini /innaneftirlitinum
Møguligar ISO certificeringar
Møguligar HCCAP certificeringar

Stutt frágreiðing um undirveitara (har undirveitari er)

Um tilboðsgevari letur inn tilboð saman við einum undirveitara, har til dømis feskar kjøtvørur verða framleiddar hjá undirveitara, skulu omanfyristandandi lýsing og skjøl eisini sendast inn fyri viðkomandi framleiðara / undirveitara.

Tilboðsgevari, ið ikki sendir inn omanfyristandandi upplýsingar, verður ikki tikin við í tilboðsviðgerðina.

# 4. Vørumóttøka

Minstu krøv til haldføri og hita v.m. eru lýst í hesum skjalið. Eisini verður víst til krøv um pakking og merking hjá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni. Stórur dentur verður lagdur á óbrotna køliketu.

Fylgiseðil skal fylgja vøruni, tvs. fysiskt eintak skal fylgja við vørumóttøku. Fylgiseðilin er grundarlagið fyri vørumóttøkuni, og er fylgiseðilin ikki við, kunnu stovnar ikki móttaka vøruna.

Landssjúkrahúsið og Glasir hava ymiskar mannagongdir fyri vørumóttøku. Tað er krav, av veitarar fylgja hesum. Vørumóttøkan hjá Landssjúkrahúsinum er kaféin og køkurin. Hjá Glasir er tað køkurin. Fyri aðrar stovnar, sum kunnu hugsast at brúka rammusáttmálan, verður álagt vinnandi veitara at gera avtalu við stovnarnar um hvussu vørumóttøkan verður skipað. Hetta skal ikki bera meirkostnað við sær fyri stovnarnar.

Glasir og Landssjúkrahúsið skulu kunnu fáa vøru allar gerandisdagar.

Vøran til Glasir skal leverast í seinasta lagi kl 7.00

Vøran til Køkin á LS millum kl 7.00-8.30

Vøran til Kafeina á LS millum kl 7.30-9.00

## *4.1. Fysiskur fylgiseðil*

Tilboðsgevarin skal við tilboðsgevan viðleggja dømi um fysiskan fylgiseðil. Tilboðsgevarin váttar við døminum, at tilboðgevarin fær viðlagt fylgiseðil við vørumóttøku frá avtalubyrjan.

Fylgiseðilin skal innihalda upplýsingar um vøru, vørunøgd og ordraupplýsingar. Hetta kann vera ordranummar ella navn á bíleggjara.

Eru viðurskifitini við fylgiseðli, pakking og góðsku ikki í lagi, verður vøran avvíst.

# 5. Returvørur

Tilboðsgevarin verður biðin um at gera eina lýsing av mannagongdini, um vøra verður avvíst orsakað av flutningsskaða, haldføri v.m. Tað er eitt krav, at henda lýsing er við.

Tá framleiðari afturkallar vørur, skal veitari beinanvegin boða frá til stovnarnar.

# 6. Bílegging, veiting og logistisk viðurskifti

Tilboðsgevarin skal kunna sikra veiting alt árið.

Vørur skulu kunna bíleggjast talgilt. Undantikið er bílegging av feskum kjøti.

Tilboðsgevarin verður biðin um at gera eina lýsing av á hvønn hátt vørubíleggingin fer fram.

Bílegging og levering av feskum kjøti verður skipað eftir avtalu við Landssjúkrahúsið og Glasir.

Tað skal bera til hjá stovnunum at bíleggja í seinasta lagi klokkan 14 dagin fyri levering.

Vøran skal veitast á teimum støðum, sum stovnarnir áseta.

Vøran skal vera væl pakkað í reinum pakkitilfari, sum er vart móti vindi og regni. Øll vøra skal vera dagmerkt.

Harumframt skulu vørubólkarnir pakkast hvør sær, soleiðis at tær ikki koma í samband við aðrar matvørur, og soleiðis at óbrotna køliketan verður varðveitt.

## 7. Veitingartryggleiki

Tað áliggur tilboðsgevara at útvega og veita allar vørur til ásettu tíðina. Veitarin skal eisini lýsa mannagongdina, um so er, at vøra gongur út, og nýggj vøra kemur ístaðin.

Tá tilboðsgevarin ikki eigur vørurnar, sum avtalan fevnir um, skal veitarin sostatt veita aðra líknandi vøru við í minsta lagi somu góðsku til í mesta lagi sama prís.

Veitarin skal í góðari tíð boða frá um ein vøra av onkrari orsøk ikki kann keypast longur. Tá skal veitarin skjótast gjørligt samskifta við stovnarnar um hvør vøra kann koma í staðin.

Um broyting er í vøruúrvalinum v.m., skulu stovnarnir hava boð um hetta beinanvegin, og prísfíla við broytingunum sendast.

Um ein av landsins stovnum, sum keypir inn eftir rammusáttmálanum, umbiður eina nýggja vøru, sum ikki er umfataður av rammusáttmálanum, verður avsláttur latin upp á nýggju vøruna, sum svarar til avsláttin í rammusáttmálanum.

## 8. Innpakking

Allur innpakkningur skal vera lættur at lata upp og at handfara.

Allar vørur skulu vera avhendaðar í innpakkningi, sum verjir vørurnar mótvegis dálking og stoyti.

Innpakkningurin skal vera 100 % PVC fríður og uttan onnur heilsu- og umhvørvisskaðilig evni/tilfar.

## 9. Kundatænasta

Innan fyri vanliga upp- og afturlatingartíð skal tilboðsgevarin kunna móttaka áheitanir fra stovnum landsins við teldupost og telefon. Tað skal vera møguligt at gera elektroniskar bíleggingar, og avlýsingar við teldupost.

Starvsfólk hjá tilboðsgevarinum skal hava nóg mikið av kunnleika um vørurnar, sum tryggjar skjóta og skikkaða avgreiðslu og ráðgeving.

## 10. Kravfestingarlisti

- Undirskrivað frumrit
- Fylgiseðil og móttøka
- Prísfíla
- Hagtalsuppgerðir og rættingar innan tíðarfreist
- Veitingartryggleiki
- Prísáseting aðrar deildir/stovnar
- Innaneftirlit og certificeringar
- Lýsing av møguligum undirveitarum
- Lýsing av prísáseting av øðrum vørum
- Lýsa við dømum hvussu tit hugsa vørumenning